

# Portørar ávara móti privatisering

Enn einaferð er ætlanin at skerja Eysturoy og Nor--Streymoy við sjúkrabilinum, hetta kemur at raka gomul, veik og sjúk. Og eisini tá so mangan brúk er fyri skjótari hjálp, tá vanlukkan rakar.

Í øðrum londum hugsast um, at hava snarhjálp so nær borgarunum sum gjørligt, tí at ofta telur hvør minuttur, bæði fyri lív og førleika, men her hugsast um pengar.

Ætlanin er, at privatisera tænastuna fyri at spara pening, hetta førur við sær, at sjúkrabilurin verður longri frá borgarunum, t.v.s. verri tænasta.

Nei, eysturoyingar og norðstreymoyingar, latið okkum standa saman við okkara sjálvsagda rætti, um trygd fyri okkum, gomul sum ung, nátt og dag.

Vit undirritaðu, sum starvast í tænastuni, heita á tygum, um at gera tygara til, at hetta ikki verður framt.

# Fyrilestur á Fiskirannsóknarstovuni

Svein Jentoft, professari í sosiologi við Lærda Háskúlan í Tromsø, heldur fyrilestur, ið hann kallar: Fiskivinnuumsiting *sæð úr samfelagsvísindaligum sjónarhorni*.

Svein Jentoft hevur síðan 1987 verið professari í sosiologi við Lærda Háskúlan í Tromsø. Hann hevur staðið á odda fyri fleiri altjóða granskingarverkætlanum um fiskivinnuumsiting og menning av fiskivinnnusamfeløgum. Hann vitjar í Føroyum í sambandi við fund í stýrisbólkinum fyri Granskingardepilin í Klaksvík.

Fiskivinnuumsiting snýr seg einamest um við samfelagsstovnum at stýra atburðin hjá menniskjum. Yvirhøvur er tað tað, ið samfelagsvísindini takast við. Hóast hetta, so er tað lívfrøðin, sum fram um alt verður hildin at vera einasti fakkunnleiki, ið krevst. Í fyrilestrinum verða grundir givnar fyri, at samfelagsvísindini eiga at verða betur umboðað í fiskivinnuumsitingini.

Sí eisini heimasíðuna www.sleipnir.fo/setur/tiltoek

# Torpederaðu stýrisskipanarlógina

Sjónligast komu veikleikarnir í nýggju stýrisskipanini til sjóndar tá Heini O. Heinesen, Sámal Petur í Grund, Jákup Sverri Kass og Finnur Helmsdal aftaná at hava rørt eitt sindur í pottinum í sambandi við skilaleysu uppsøgnina av landsverkfrøðinginum kortini sluppu løgmanni undan at taka tær avleiðingar sum skuldu takast nevniliga at koyra landsstýrismannin Finnboga Arge. Harvið var tað grundstøði sum stýrisskipanar lógin var ætlað at hvíla á máað burtur.

Tí landsstýrismaðurin segði ósatt fyri almenninginum og løgtinginum og tá hann innanfyri tveir dagar megnaði at geva tríggjar ymsar frágreiðingar um orsøkina til at hann segði landsverkfrøðingin úr starvi so tvær av hesum eyðsæð ikki samsvarandi veruleikanum.

Tað var helst í lagi at royna eina nýggja skipan við sokallaðari ministaraábyrgd aftaná at lógin sum bygdi á kollektiva ábyrgd hjá landsstýrinum var roynd í 50 ár. Men skal hendan skipan geva tað sum ætlað er mugu avleiðingar av mistøkum og misgerðum frá tí sum hevur ministaraábyrgdina takast. Og tann, ið skal føra hetta út í lívið er eingin annar enn løgmaður og hetta hevur síðan vundið uppá seg. Til hevur borið hjá landsstýrismanninum í almannamálum at vera eina søguna fyri og aðra eftir fram sum ikki er í samsvari við veruleikan uttan at løgmaður letur hetta fáa avleiðingar, og onnur dømi eru.

Tá lógin um nýggja stýrisskipan var til fyrstu viðgerð ávaraði undirritaði ímóti at skunda broytingar ígjøgnum, men taka neyðugu tíðina til at styrkja løgtingsumsitingina á løgfrøðiligu síðini soleiðis at løgtingið kundi geva landsstýrinum eitt mótspæl og fara fram stigvíst heldur enn at skunda broytingarnar ígjøgnum. Hetta fekk ikki undirtøku. Ístaðin var farið undir eina umskipan av umsitingini í Tinganesi eftir donskum leisti har aðalstýrini vóru uppbygd og tú oysti fólk inn í hesa umsiting í mongum føri uttan atliti til førleikan hjá hesum fólkum at umsita forsvarliga.
Vinnumálastýrið kanska hitt fremsta dømi um eitt hús sum er vorðið fylt upp við inkompetansu men kortini við slíkari politiskari makt, at til bar at lemja tann mest framkomna vitanarstovn og ein hin frægast virkandi arbeiðsstovn - Landsverkfrøðingsstovnin.

Verður ikki framyvir tryggja at løgtingið fær arbeitt demokratiskt, og landsstýrismenn mugu taka avleiðingar av misgerðum sínum, so sær ikki ov gott út fyri demokratiið.

Nú vita vit at ein samgonga altíð hevur gingið og framhaldandi vil ganga rættiliga langt fyri at halda samgonguna á lívi til tess at fremja samgongusetningin, men tað er ógvuliga lætt og lættari enn fyrr, at fara av kósini tí í telvinginum millum løgting og landsstýrið, gerst løgtingið hin veikari.

Tann gamla stýrisskipanarlógin var viðvíkjandi maktbýti avbalanserað og tað við vilja av fedrum lógarinnar, tí løgting og landsstýri á ein hátt kundu halda hvørt annað í skáki, tí løgmaður kundi ikki útskriva løgtingsval, kundi ikki avseta tingið, einans biðja tingið um at upploysa seg sjálvt og tingið hinvegin kundi ikki avseta løgmann tá hann einaferð var valdur.

Henda skipanin varð slept, tí nú skuldi ministarin einsamallur standa við ábyrgdini og taka avleiðingar av sínum mistøkum og tað hevði verið í lagi um skipanin virkaði so men vit síggja nú at skipanin virkar ikki, harafturat síggja vit í verki hvussu eitt ódemokratiskt rák ger meira og meira vart við seg hjá summum landsstýris og løgtingsmonnum og fremstur teirra er sjálvur forsprákarin fyri fullveldi, sum loysn hevur fullveldi á øllum spurningum her í verðini.

Merkti mær at hann helt at fullveldi mundi fara at hjálpa uppá demokratiið og fáa hesi tingini aftur á beint. Tað er ikki eiti á gandakraft sum er í hesum fullveldi, sum umframt at fáa demokratiið at virka, eisini skal fáa hugflogið at skapa nýggj kor, arbeiði, nýggjar vinnur og so framvegis og eitt gevandi altjóða samarbeiði, sum skal loysa flestu av okkara trupulleikum.

Løgið at hesin maðurin ikki sjálvur sær, hvussu langt úti tað er, at leggja fullveldinum hesar eginleikar til. Undir arbeiðinum við broytingini av stýrisskipanini var ikki loysingin havd í huga, men tað teir kalla fullveldi er at loysingin skal proklamerast. Nýggja stýrisskipanin var ætlað at vera eitt stig á leiðini til eina nýggja sjálvstýrisskipan. Ístaðin eru komin í eina støðu, sum á ódemokratiskan hátt skal trýstast inn á okkum.

Tað er møguligt, at fólk skjótt venja seg við, at hetta er í lagi, gloyma tær ógvusligu almennu peningaupphæddir menn hava loyvt sær at nýta, snøkt sakt í reinari flokspolitiskari propagandu fyri fullveldi.

Kortini kann ein vóna, at ein gongd fæst í lag, sum hevur møguleika fyri eina fult demokratiska telving og samarbeiði millum løgting og landsstýri, men livst so spyrst. Nú tykjast so menn at vera farnir at røra eitt sindur í pottinum aftur og gera vart við sína misnøgd yvir tað skendsilsgerð, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum framdi, tá hann jarðlegði ein týðandi stovn, bert orsaka av einum »kompetansu stríði« ímillum eitt lítið fullført stýri í Tinganesi og ein ógvuliga vælbornan stovn undir landsstýrinum.



Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður



# Einki at skriva heim um

*Forkvinnan í Føroya Lærarafelag væntar, at mánadagin byrja realitetsamráðingarnar við Fíggjarmálastýrið. Tað er spurningurin um arbeiðstíð, sum sambært fyribilssemjuni skal avgreiðast nú*

DAGFINN OLSEN

- Í grundini er einki at skriva heim um, sum tikið verður til, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen, tá hon verður spurd um gongdina í samráðingunum við lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum.

- Sambært fyribilssemjuni frá í fjør, so skal punkt 5, ið snýr seg um arbeiðstíð, avgreiðast áðrenn 15. januar, sigur Elsa Birgitta Petersen.

**Veruligar samráðingar**

Til samráðingarnar í fjør komu partarnir bert fram til eina fyribilssemju. Partarnir skuldu hittast aftur í vár.

Partarnir hava havt fyrstu fundirnar og hava lagt fram síni sjónarmið.

Fundur er avtalaður at verða aftur mánamorgunin og væntar Elsa Birgitta Petersen, at farið verður undir veruligar samráðingar mánadagin.

Føroya Lærarafelag hevur lagt stóran dent á, at skal arbeiðast eftir nýggju fólkaskúlalógini, so skal tíð vera til neyðuga umsiting og ráðlegging. Hetta er mett at kosta einar 18 milliónir krónur.

- Arbeiðstíð og ymsu uppgávurnar skulu avgreiðast í seinasta lagi 15. januar, sambært fyribils semjuni. Annars er ikki stórvegis at viðmerkja, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag, sum skal til samráðingarborðið mánamorgunin klokkan 10:00.



*Enn er vónleyst at siga, hvussu útlitini eru fyri semju millum Fíggjarmálastýrið og Lærarafelagið (tilvildarlig mynd)*

# Bókaklubbatíðindi í litum og nýggjum sniði

*Bókadeild Føroya Lærarafelags metir, at við nýggju øldini var so frálíkur møguleiki at gleða limirnar og geva Bókaklubbatíðindum nýtt snið og litir*




*Bókaklubbatíðindi koma nú í litum og nýggjum sniði*

DAGFINN OLSEN

Niels Jákup Thomsen frá Bókadeildini sigur í oddagrein í litføgru útgávuni av Bókaklubbatíðindum, at høvið tyktist so sjálvsagt at broyta snið, nú vit eru komin í nýggja øld.

Endamálið er at veita limum betri tænastu. Nú sæst í litum, hvussu bøkurnar síggja út og nýggja sniðið gevur eisini tvífalt pláss at kunna um nýggjar bøkur og um bøkur, ið hava verið frammi, men sum eiga at verða tiknar fram aftur.

Hesin táttur verður nevndur Bókahillin.

**William setur dám á**

Bókadeildin sigur, at bókavárið 2000 verður merkt av, at kendasti rithøvundur Føroya, William Heinesen, hevði fylt 100 ár 15. januar.

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út bók í hesum sambandi, Veingjaða Myrkrið, ið Edward Fuglø hevur myndprýtt so hegnisliga, at eisini Gyldendal í Danmark og Mál og Menning í Íslandi geva bókina út.

# Sprotin fyri vaksin

*Sprotin stovnar bókaklubba fyri vaksin. M.a. týðingar, sum lisnar eru í útvarpinum, verða útgivnar*

DAGFINN OLSEN

Forlagið Sprotin hevur fingið innivist í Bókaklubbatíðindum at siga frá nýggjum spennandi tiltaki.. Sprotin er virkið forlag og ætlanir eru nú um at stovna bókaklubba fyri vaksin.

Sprotin lýsir við 10 bókum, sum er á veg og nakrir av høvundunum eru Sandemose, Hoel, Lagerlöf og Tolstoj. Týðingar, sum Hans Thomsen, Finnbogi Ísakson og onnur hava gjørt, og sum lisnar eru í útvarpinum, verða útgivnar.

Ein kann melda seg til á Bókamiðsøluni á Hoyvíksvegnum, um ein hevur áhuga í at gerast limur.


